# Býráðsfundur 28.10.2024

**Býráðsfundur 28.10.2024 kl. 18.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**Mál til viðgerðar:**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 84/2024 – Umsókn um eyka tímar til børn við serligum tørvi – Frítíðarskúlin | ALMENT |
| Mál nr. 85/2024 – Umsókn um grundstykki | ALMENT |
| Mál nr. 86/2024 – Umsókn um uppískoytisstykki | ALMENT |
| Mál nr. 87/2024 – Starvsfólkamál | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 88/2024 – Fíggjarætlan 2025 – Nes kommuna 1. Viðgerð | ALMENT |

## Mál nr. 84/2024 – Umsókn um eyka tímar til børn við serligum tørvi – Frítíðarskúlin ALMENT

J.nr.: 1802-18-2024

Skriv er komið frá leiðaranum í Frítíðarskúlanum har hon søkir um eyka tímar til børn við serligum tørvi.

Talan er um tvey børn. Sí viðløgdu frágreiðingar.
Søkt verður um tilsamans 20 eyka tímar um vikuna.

**Á fundi, tann 15.10.2024, mælir Trivnaðarnevndin til at játta 20 eyka stuðulstímar um vikuna fram til 15.04.2025.**

**Á fundi, tann 22.10.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini og at fíggingin verður tikin av stovninum "Børn við serligum tørvi".**

**Tilmælini hjá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

# Býráðsfundur 28.10.2024

**Mál nr. 85/2024 – Umsókn um grundstykki** **ALMENT**
J.nr.: 1205-19-2024

Í teldubrævi til Aksel Højgaard dagfest, tann 25.08.2024, sendur Elibert Kirke fyrispurning um møguleikan at keypa grundstykkið, ið liggur millum Rókaveg 16 og 18, matr. nr. 285a.

Tekniska deild metir, at stykkið kann nýtast til sethúsabygging, og tískil kann kommunan viðmæla at borgarin keypir stykkið frá Búnaðarstovuni.

**Á fundi, tann 17.10.2024, mælir Tekniska nevnd til at viðmæla at umsøkjarin fær stykkið.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 86/2024 – Umsókn um uppískoytisstykki** **ALMENT**
J.nr.: 1205-8-2022

Í teldubrævi til Aksel Højgaard táverandi tekniska leiðara dagfest, tann 12.04.2022, sendur Ása Hansen fyrispurning um at keypa meira lendi afturat til ognina á Heygsvegi 38 matr. nr. 452 á Toftum.

Talan er um ískoytisstykki omanfyri ognina, og niðan móti almennu gøtuni omanfyri (sí viðhefta kort).

Drúgt samskifti liggur millum partarnar hesum víðvíkjandi (sí viðhefta teldupostsamskifti millum tekniska leiðaran og umsøkjaran) – og at enda steðgaði málið og bleiv ikki tikið uppaftur tá.

Síðan hevur umsøkjarin, tann 02.10.2024, aftur vent sær til Aksel, um keyp av ískoytisstykkið. Hesaferð bara omanfyri ognina, og niðan móti almennu gøtuni omanfyri (sí viðhefta kort).

Tekniska deild metir, at umsóknin um jarðarkeyp ikki kemur í vegin fyri øðrum ætlanum kommunnurnar í økinum, og tískil mælir tekniska deild til at viðmæla umsóknini.

**Á fundi, tann 17.10.2024, mælir Tekniska nevnd til at viðmæla at umsøkjarin fær uppíkoytisstykki.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

# Býráðsfundur 28.10.2024

**Mál nr. 88/2024 – Fíggjarætlan 2025 – Nes kommuna 1. viðgerð** **ALMENT**

J.nr.: 1107-5-2024

| | | 2025 | | 2024 v/eykaj. | | Munur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| §20 Kommunuskattur | tkr. | 69.149 | tkr. | 64.256 | tkr. | 4.892 |
| §20 Húsaleiguskattur | tkr. | 15 | tkr. | 5 | tkr. | 10 |
| §20 Felagsskattur | tkr. | 1.800 | tkr. | 1.500 | tkr. | 300 |
| §20 Eftirlønargjøld | tkr. | 14.965 | tkr. | 13.530 | tkr. | 1.435 |
| §20 Tøkugjald | tkr. | 15 | tkr. | 0 | tkr. | 15 |
| §20 DIS, FAS v.m. | tkr. | 2.876 | tkr. | 2.770 | tkr. | 106 |
| **Inntøkur í alt** | **tkr.** | **88.520** | **tkr.** | **82.062** | **tkr.** | **5.677** |
| | | | | | | |
| §1 Kommunal Fyrisiting | tkr. | 8.251 | tkr. | 7.491 | tkr. | 760 |
| §2 Almanna- og heilsumál | tkr. | 28.545 | tkr. | 26.009 | tkr. | 2.536 |
| §3 Børn og ung | tkr. | 15.699 | tkr. | 15.977 | tkr. | -470 |
| §4 Undirvísing | tkr. | 5.400 | tkr. | 5.129 | tkr. | 271 |
| §5 Mentan og frítíð | tkr. | 6.074 | tkr. | 6.974 | tkr. | -900 |
| §6 Teknisk mál | tkr. | 8.640 | tkr. | 7.370 | tkr. | 1.270 |
| §7 Kommunal virki | tkr. | 3.812 | tkr. | 3.885 | tkr. | -73 |
| **Rakstur í alt** | **tkr.** | **76.421** | **tkr.** | **73.027** | **tkr.** | **3.394** |
| | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn fíggjarkostnað og íløgur** | **tkr.** | **12.099** | **tkr.** | **9.035** | **tkr.** | **3.064** |
| | | | | | | |
| §20 Rentustuðul | tkr. | 1.850 | tkr. | 1.800 | tkr. | 50 |
| §20 Rentuútreiðslur | tkr. | 1.400 | tkr. | 1.091 | tkr. | 309 |
| **Fíggjarkostnaður í alt** | **tkr.** | **3.250** | **tkr.** | **2.891** | **tkr.** | **359** |
| | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur** | **tkr.** | **8.549** | **tkr.** | **6.144** | **tkr.** | **2.705** |
| | | | | | | |
| §1 Kommunal Fyrisiting | tkr. | 0 | tkr. | 0 | tkr. | 0 |
| §2 Almanna- og heilsumál | tkr. | 222 | tkr. | 47 | tkr. | 175 |
| §3 Børn og ung | tkr. | 1.700 | tkr. | 1.320 | tkr. | 380 |
| §4 Undirvísing | tkr. | 720 | tkr. | 3.400 | tkr. | -2.680 |
| §5 Mentan og frítíð | tkr. | 5.316 | tkr. | 3.840 | tkr. | 1.476 |
| §6 Teknisk mál | tkr. | 1.633 | tkr. | 8.461 | tkr. | -5.878 |
| §7 Kommunal virki | tkr. | 4.837 | tkr. | 6.496 | tkr. | -1.659 |
| **Íløgur í alt** | **tkr.** | **14.428** | **tkr.** | **23.564** | **tkr.** | **-9.136** |
| | | | | | | |
| **Úrslit í alt** | **tkr.** | **-5.279** | **tkr.** | **-17.421** | **tkr.** | **-12.142** |

**Fyritreytir og viðmerkingar til tølini omanfyri**

- Skattaprosentið er sett óbroytt til 20,5%.
- Barnafrádrátturin er hækkaður frá kr. 6.000 kr. til 7.000.

**Á fundi, tann 22.10.2024 mælir Fíggjarnevndin til at skattaprosentið verður óbroytt 20,5%, og at barnafrádrátturin verður hækkaður frá kr. 6.000 til kr. 7.000.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Á fundi, tann 22.10.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við 1. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2025, so sum ásett omanfyri.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**